

www.oljan.fo

**Jan Müller** 17 - 02 - 2013

# Faroe Petroleum við í oljuútgerðarhavn í Íslandi

Føroyska oljufelagið Faroe Petroleum gongur ikki bert á odda, tá tað ræður um oljuleiting á íslendska landgrunninum. Felagið er eisini ein av stigtakarunum til fyrstu oljuúterðarhavnina í Íslandi nakrantíð skrivar Mortunblaðið. Eitt felag undir stovnan, sum skal veita tænastur í sambandi við oljuleiting á Drekaleiðini norðan fyri Ísland, hevur nú søkt kommununa í Húsavík um lendi til at gera eina útgerðarhavn til frálandavinnu. Umboð fyri felagsstovnararnar hava verið og kannað ymsar møguleikar á Norðurlandinum og Eysturlandinum, og teir hava nú valt Húsavík sum tað best egnaða staðið. Morgunblaðið skrivar, at Þorkell Erlingsson og Þröstur Ólafsson, sum hava sent kommununi í Húsavík umsóknina um lendi, umboða føroyska Faroe Petroleum og íslendska felagið Íslensku kolvetni ehf. , sum hava fingið loyvi at leita eftir olju á Drakaleiðini. Sambært umsókknini til kommununa skal útgerðarfelagið brúka eitt øki upp á 10.000 fermetrar til rør og ymiskan boriútbúnað, 2.000 fermetrar til tangar og lendi til ein bygning at hýsa viðkvæmari vøru. Harafturat skal havnin veita vanliga skipatænastur so sum feskt vatn, olju og el. Kommunustýrið hevur tikið væl ímóti umsóknini og hevur biðið fyrireikararnar um fund fyri at fáa fleiri nágreiniligar upplýsingar, sum síðani skulu leggjast fyri tær ymsu kommunalu nevndirnar, áðrenn endalig avgerð verður tikin. Tað var eisini Faroe Petroleum, sum saman við øðrum feløgum og fyritøkum, ið tók stig til føroysku útgerðarhavnina í Runavík á sinni. So kann kann siga, at felagið hevur gjørt sær sínar royndir á hesum øki eisini. Mynd Stjórin í Faroe Petroleum, Graham Stewart her saman við íslendska forsetanum og stjóranum í íslendska oljufelagnum, Icelantic Petroleum.